Listastevnan 2004:

# Listarligu stjørnurnar gera innrás

**Kiri Te Kanawa. Jostein Gaarder. Jethro Tull. Eivør Pálsdóttir. Teitur Lassen. Fjórða árið á rað er listastevnan á skránni, og formaðurin í stýrinum, Kartni Ravnsfjall, nýtist bert at vísa til stóru nøvnini, sum í grundini sigur alt. - Áskoðarar og áhoyrarar kunnu aftur í ár gleða seg til fleiri stór nøvn við listarligari góðsku í ríkum máli, sigur Kartni Ravnsfjall**

LISTASTEVNAN 2004
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Kartni Ravnsfjall er á fyrsta sinni formaður í stýrinum fyri listastevnuna, og hann gleðir seg avbera nógv til listastevnuna 2004. - Vit kunnu lova áhoyrarum og áskoðarum list á høgum støði í ríkum máli, sigur Kartni Ravnsfjall*

*Mynd: Maria Olsen*

– Vónirnar eru stórar, og vit eru sera spent.

Soleiðis sigur stýrisformaðurin fyri listastevnuna, Kartni Ravnsfjall, sum saman við samskiparanum Oddvá Nattestad á fyrsta sinni stendur fyri eini listastevnu, eftir at Birgir Kruse tók seg aftur.

Og maðurin hevur rætt. Við heimskendum útlendskum nøvnum sum Jethro Tull, Kiri Te Kanawa, Jostein Gaarder og The Celtic Tenors saman við okkara egnu Eivør Pálsdóttir, Trónda Patursson og Teiti Lassen kunnu vónirnar ikki vera annað enn stórar fyri ársins listastevnu, sum varð sett fríggjadagin.

### Fyrireika árið runt

Kartni Ravnsfjall gjørdist partur av fyrireikingunum í februar, og hann sigur, at tað hevur verið ein spennandi tíð. Hóast hann ikki hevur verið við fyrr, sigur hann, at fyrireikingarnar í dag eru lættari enn fyri samskipararnar fýra árum síðani, tá listastevnan á fyrsta sinni varð hildin.

– Gjøgnum hesi fýra árini hevur listastevnan prógvað sítt virði, og í staðin fyri at skula út at leita eftir áhugaðum luttakarum, er tað í størri mun listarfólkini sjálvi, sum venda sær til fyrireikararnar við fyrispurningum um møguleikar at luttaka á listastevnuni, sigur Kartni Ravnsfjall.

Spurdur, hvussu leingi fyrireikingarnar eru til slík tiltøk, sigur Kartni, at tær langt síðani vórðu farnar í gongd, tá hann kom inn í myndina.

– Listastevnan verður hildin einaferð um árið, og so skjótt ein stevna er liðug, verður farið í holt við næstu stevnuna, so fyrireikingarnar koyra árið runt, sigur nýggi formaðurin.

### Stórar stjørnur

Kartni Ravnsfjall sigur, at nógv stór nøvn vera at síggja og hoyra, sum borga fyri listarligari góðsku, og spurdur, hvørji størstu nøvnini eru, tekur hann tvey tónleikanøvn framum alt annað.

– Heimskenda operasangarinnan Kiri Te Kanawa og bretski tónleikabólkurin Jethro Tull eru helst størstu nøvnini á ársins listastevnu, sigur Kartni uttan at drála. Hann heldur, at hesi nøvn eru eitt prógv um, at fyrireikingarnar eru somikið professionellar, at sjálvt tey størstu hava hug at koma hendavegin.

– Norðurlandahúsið er eisini eitt frálíkt hús og skapar røttu umstøðurnar, og karmarnir kring tiltakið kundu ikki verið betri, hóast vit sjálvsagt ikki klára at hýsa stóru fjøldunum, sigur Kartni Ravnsfjall.

### Dýr atgongumerki

Tað hevur fleiri ferðir verið funnist at listastevnuni fyri ov dýrar kostnaðir til tiltøkini, men Kartni sigur, at kostnaðarstøði noyðist at ásetast soleiðis, at tiltakið melur runt fíggjarliga.

– Tað kostar nógv at fáa slík nøvn hendavegin, og t.d. Jethro Tull og Kiri Te Kanawa fáa sjálvsagt samsýningar fyri sínar framførslur, hóast tey á ongan hátt koma her fyri peningin, sigur Kartni Ravnsfjall.

Formaður í stýrinum fyri listastevnuna sigur, at tað er ógvuliga dýrt at fáa kend nøvn hendavegin, og avleiðingin er so, at kostnaðurin á atgongumerkjunum fer upp.

– Men allastaðni er tað so, at eitt stórt navn kostar nógvan pening, og hetta eru so spælireglurnar, sigur Kartni, sum ikki metir prísin vera so høgan, sum summi vilja gera hann til.

Sum heild gleðir Kartni Ravnsfjall seg avbera nógv til listastevnuna 2004, og lovar hann áhoyrarum og áskoðarum list á høgum støði í ríkum máli.

Filmir á Listastevnuni:

# Óndskapur

**– Jan Guillou skrivaði eina skaldsøgu um hørðu árini á einum svenskum kostskúla, ið er gjørd til film**

**Kim Simonsen**
*Ummæli*

Næmingurin Erik Ponti verður blakaður úr realskúlanum, tí hann berjist ov nógv. Heima hevur hann ein sadistiskan verfaðir, ið slær bæði hann og mammuna. Hann endar á fína yvirstættarkostskúlanum Stjärnsberg, hetta er seinasti møguleikin hjá honum at fáa ein møguleika at fara á studentaskúla, men har byrjar harðskapurin av álvara. Hesin skúlin er ein óhugnalig mynd av einum yvirstættarskúla, har eldru næmingarnir taka sær av at uppdraga teir yngru. Hetta er ein heimur, har alt er stigskipað, har ríkir dreingir læra at munur er á fólkum.

Filmurin »Ondskaben« er um ein drong, hvørs lív er fylt við harðskapi. Erik er bæði klókur og sterkur, hann er ein góður svimjari, men hann fær ikki frið. Tá hann endeliganí svarar harðskapinum er tað øgiligt, hann knúsar pláguondirnar. Erik er innast inni eitt gott menniskja. Tá hann byrjar á skúlanum møtir hann Pierre Tanguy, ið er hin mest dugnaligi næmingurin á skúlanum. Pierre er ein lesihestur og ein stillur humanistur og pasifistur, ið lærir Erik hvat er neyðugt fyri at yvirliva á harðrenda skúlanum. Á skúlanum er elsti næmingurin yvirstættardrongurin Otto Silverhielm ein psykopatiskur bøðil, ið hevur fingið alt vald fra lærarunum at sláa og buka yngru næmingar. Í leiklutinum, sum hin óndi og tragiski Silverhielm, síggja vit sonin hjá Stellan Skarsgård, Gustaf Skarsgård. Silverhielm umboðar harðskapin og óndskapin, men Erik er vanur við slíkar ráar fanar. Erik berjist sjálvur við sítt egna myrka sinn. Tað serliga við Erik, er at hann hevur mist alt og tí ræðist ongan, heldur ikki harðskap, og tí gerst hann við eitt óvinur við teir eldru harðligu næmingarnar. Mest av øllum ræðist hann seg sjálvan, tí hann kann sum einki vinna á teimum øllum. Leikur er settur til ein ræðuligan sálarligan og likamligan bardaga.

Hesin filmurin er eitt geyl av pínu og snýr seg um ein drong, ið ongan góðan hevur í einum ráum og harligum heimi. Hann hevur lært seg at sláa aftur, men hetta dulmar ikki pínuna í hjartanum av hesum hótta og vónbrotna mannabarnið. Tað er óhugnaligt, at Jan Guillou skrivaði bókina um veruleikan. Hann hevur sjálvur gingið á einum kendum kostskúla í Svøríki. Hetta eru hendingar, ið eru farnar fram. Filmurin er ógvusligur og vit syrgja stillisliga lagnuna hjá hesum drongingum, sum øll menniskju gera tá tey síggja stóran órætt. Hesin filmurin minnir um skaldsøguna og filmin »Det forsømte forår« eftir Hans Scherfig. Lærarnir eru snobbutir gamlir menn í klædningi. Teir flestur reinir psykopatar og nasistar við akademiskum titlum. Scherfig skrivaði hesa øgiligu uppgerð, ið var alneyðug við ein skúla, ið meislaði einstaklingin. Ein skúli, ið avspeglaði ráa samfelagið og ein rotnan moral um at bert tey sterkastu yvirliva. Scherfig bygdi sína skaldsøgu á lærarar, ið øll kendu tá. Guillou hevur gjørt tað sama og ein slík hevnd er á rætta stað. Guillou hevur skriva eina av teim mest dramatisku skaldsøgunum í svenskum bókmentum. Tað ringasta man kann gerða móti einum psykopatiskum lærara og einum óndum skúla, er at skriva um hann og avklæða sjúku menskuna. Eg kendi meg sjálvan aftur í hesum filminum. Ráa skúlan, harðskapin og sálarliga ágangin, ið gjørdi at tey flestu lærdu einki av reinum ótta. Hetta var hin bølasvarti skúlin. Ì dag er alt broytt, men vit sum hava gingið í hesum óhugnaliga skúla hava øll arr á sálini meiri ella minni. Ein dag kemur onkur av okkum at skriva eina føroyska »Det forsømte forår«. Tey sum meisla eitt barn skulu verða avdúkaði. Jan Guillou skrivaði hesa bókina í 1981. Hon er í dag ein klassikkari í Svøríki í dag, ið 2 milliónir fólk hava lisið. »Det forsømte forår« er helst ein enn størri klassikari.

Filmurin »Ondskan« minnir um skaldsøgurnar hjá Bjarne Reuter »Zappa« og »Når snerlen blomstrer«. Erik er bæði offur og ein hetja, men sum allar hetjur kennir Erik ikki seg sjálvan enn. Erik broytist, tá hann møtir vinin Pierre og seinni tá hann gerst ásttikin í gentuni Marju frá Finnlandi. Bøðlanir brúka hetta ímóti honum, teir byrja at buka hin veika og klóka Pierre, ið gevst á skúlanum og teir siga stjóranum frá, at hann hevur samband við eina gentu.

Filmurin tematiserar óndskapin og snýr seg um harðskap. Erik verður álopin av eldru næmingunum. Hann dugir væl at berjast og kann sorla teir sundur, men hann vil ikki verða blakaður út úr skúlanum. At enda slær hann aftur við einari øgiligari megi. Tað sum er løgi í hesum filminum, er at vit sum hyggjarar einki hava ímóti hesum øgiliga harðskapi, tí Erik og Pierre hava verið píndir í so langa tíð. Hesin filmurin megnar at tematisera størsta temaði millum menniskju, ið er óndskapur. Er menniskjað gott? Ella er menniskja ónt og fylt við frumkendum harðligum instinktum? Pierre vinurin, sigur við Erik, at hann skal royna at hugsa um Gandhi, tí tá fer hann at vinna ikki bert á sær sjálvum, men á teim harligu.

Hetta er ein harður og góður filmur.

6.–9. august.
Ondskan
Svøríki, 2003.
Leikstjórn: Mikael Håfström
107 minuttir.



# Helvtin av toskinum á Føroyabanka er »defektur«

**– At veiðitrýstið á Føroyabanka er ov stórt, er eingin ivi um. Nógv minni av stórum toski er uppi í veiðini í ár og umleið helmingurin av toskinum, vit fáa, er »defektur« – á tann hátt, at munnklovin øðrum megin og viðhvørt báðumegin er skræddur av húki, sigur Mortan Johannesen, útróðrarmaður**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Skipini draga skjótt, og tey draga at kalla í øllum veðri og næstan í øllum streymi. Tann stóri toskurin er tungur, og tá ið nógv stendur á, skrædnar húkurin úr munnklovanum. Hetta er eitt fyribrigdi, sum eg avgjørt haldi eigur at takast við í metingarnar av veiðitrýstinum á Føroyabanka, sigur Mortan Johannesen, sum her stendur undir liðini á soninum, Andriasi Johannesen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Mortan Johannesen, eisini nevndur Mortan hjá Andriasi í Hvannasundi, hevur verið á sjónum, síðan hann var stórur smádrongur. Í nógv ár sigldi hann sum skipari, og mangir eru teir, sum hava verið saman við hesum fryntliga og positiva manni sum heldur einki vera ómøguligt. Mortan hevur eisini roynt seg í alivinnuni og framleiðsluvinnuni á landi, men seinastu árini hevur hann verið útróðrarmaður umborð á nýggjum báti, sum AWI-Boats í Runavík hevur bygt honum. Hetta er ein dreymur hjá mongum manni, sum sigldi øll síni bestu ár, og Mortani dámar ógvuliga væl lívið sum útróðrarmaður. Hann fiskar bara við snellu, og í fjør avreiddi hann fyri 600.000 kónur. Hetta er eitt gott ár, tá ið havt verður í huga, at snelluveiðan ikki er so dýr í rakstri.

### »Defektur« toskur

Mortan Johannesen, sum bæði í fjør summar og í ár hevur roynt á Føroyabanka við snellu, heldur, at toskurin á bankanum er rættiliga illa fyri, hóast ríkiligt er at føði.

– Alt bendir á, at royndin á bankanum er ov stór. Veiðan er ikki hin sama í ár sum í fjør. Í fjør var eini 60-70% av veiðini 1’arar ella stórur toskur. Nakað var av 2’arum og lítið og einki av 3’arum. Í ár liggur parturin av tí stóra toskinum úr eini 10% og niður í einki. Hetta er ein rættiliga stór broyting frá einum ári til annað, vísir Mortan Johannesen á.

Hann hevur eisini heft seg við eitt undarligt fyribrigdi á Føroyabanka í ár í mun til onnur ár.

– Tað er ikki óvanligt, at tú fært fisk, sum hevur verið á húki áður. Hetta hendir av og á, og í fjør fekk eg eisini nakrar toskar á bankanum, sum hava verið á húki.

Men, sigur Mortan:

– Eg haldi, tað er ófrættakent at síggja toskin á bankanum í ár. Meira enn annar hvør toskur er skræddur í munnklovanum – í minsta lagi øðrumegin og í fleiri førum báðumegin.

Hann vísir á, at toskurin er týðiliga merktur av, at royndin eftir honum er ov stór, tá ið meira enn annar hvør toskur er »defektur«.

– Hetta havi eg í mínum langa lívi á sjónum ongantíð sæð áður, sigur Mortan.

Útróðrarmaðurin setir spurningin, hvat tað kann merkja fyri toskin, at vøddarnir í munnklovanum á einum so stórum parti av fiskinum eru skræddir.

### Nógv føði

Vit spurdu, um fiskurin á bankanum hevur nóg mikið at eta.

– Ja, tað er sprenfult av føði á bankanum, og soleiðis var eisini í fjør summar. Líkt er tó til, at upsin hevur yvirtikið ein stóran part av grunninum. Tað er so nógvur upsi á bankanum, at vit, sum royna við snellu, mangan sigla undan honum.

Hann vísir á, at toskurin, sum er illa farin av húki, ikki er so rundur og feitur, sum hann átti at verið, nú honum ikki vantar føði. Hinvegin er upsin feitur, men smáttfallandi.

Mortan, sum hevur fingið manga fiskarúgvuna inn á dekkið í sínum langa lívi á sjónum, sigur, at hann ongantíð áður hevur sæð fisk so illa farnan, sum toskin á Føroyabanka.

– Hetta er eitt fyribrigdi, sum eg avgjørt haldi eigur at takast við í metingarnar av veiðitrýstinum.

### Hálv miljón húkar

Útróðrarmaðurin vísir á, at royndin á bankanum er ógvuliga stór, serliga línuveiðan.

– Skipini draga skjótt, og tey draga at kalla í øllum veðri og næstan í øllum streymi. Tann stóri toskurin er tungur, og tá ið nógv stendur á, skrædnar húkurin úr munnklovanum.

Mortan vísir á, at alt síðsta summar, síðsta heyst, vetur og í gýtingartíðini stóðu ein hálv miljón húkar á Føroyabanka hvønn dag, 24 tímar um samdøgnið.

– Eg eri á ongan hátt ímóti línuflotanum, men tað er ein sannroynd, at hesir bátar eiga meginpartin av húkunum, sum stútt og støðugt standa á bankanum.

Hann sigur, at partrolararnir liggja eisini tætt uppat bankanum, og viðhvørt koma hesir upp á so grunt vatn, at toskur eisini er uppi í veiðini.

– Var eg umborð á einum av hesum trolarum, hevði eg eisini ligið so tætt upp at bankanum, sum eg kundi. Men spurningurin er, um støðan hjá toskinum ikki er rættiliga álvarsom, nú royndin hevur verið so stór í langa tíð, sigur Mortan Johannesen, sum hevur havt 33-fót stóra útróðrarbátin í stívliga tvey ár.

Honum dámar ógvuliga væl lívið sum útróðrarmaður.